# Íblástur úr hitarúminum

**Eivør Pálsdóttir, sum helst er framum alt er kend fyri at syngja, letur um góðar tvær vikur upp listaframsýning í Ribarhús í Fuglafirði. Hetta er hennara fyrsta listaframsýning**

LIST
*Ingrid Bjarnastein*



*Eivør Pálsdóttir letur tann 4. maj upp sína fyrstu egnu listarframsýning í Ribarhúsi í Fuglafirði*
*Mynd: Jens Kristian*

Hon er einans 18 ung ár, og hon hevur sungið seg inn í hvørt manshjarta her í Føroyum. Leygardagin 4. mai letur hon upp sína fyrstu egnu listarframsýning í Ribarhúsi í Fuglafirði. Vit tosa um Eivør Pálsdóttir, sum mánadagin í seinastu viku, kom aftur eftir ein tríggjar mánaða langan steðg í Íslandi.

– Eg havi altíð fingist við at mála, men nú eg havi hildið ein steðg frá sangi, hevur tað tikið dik á seg, sigur Eivør. – Myndirnar eru umfata mest fólk, sum sita á ymsan hátt. Eg brúki nógv hugflog, máli stemningar og ymiskt, sum eg havi upplivað.

Nú meðan hon hevur verið í Íslandi hevur hon sett sær fyri at hava eina listaframsýning. – Teirra land líkist nógv okkara, har eru skiftandi litir, og tey hava vakra náttúru. Meðan eg var í Íslandi var eg og svam hvønn dag. Tá eg var liðug at svimja fór eg í hitarúmið, og tað er har eg havi funnið mín størsta íblástur. Har eru so nógv fólk, tey sita so løgið, á ymsan hátt, hokin framyvir og annað, og nógvar av mínum myndum havi eg fingið úr hitarúminum.

– Stemningurin í hitarúminum er løgin. Øll sita mestsum í síni egnu verð. Kedd, glað, ov heit, og haðani kann ein fáa nógvar myndir.

### Ímóti ljósinum

Framsýningin eitur "Ímóti ljósinum". Og hava allar myndirnar okkurt við hetta evnið at gera.

– Eg havi altíð málað, men eg haldi eg havi fingið tað frá pápa mínum, sigur Eivør. – Eg brúki nógv kontrastina millum ljós og myrkur. Og at hava eina listaframsýning er nakað, sum eg havi ætlað leingi, og nú verður tað so.

Vit fara yvir í grannahúsið, har Eivør hevur sítt egna "atelier". Við eini 200 W peru leggur hon eina síðstu hond á málningarnar.

Á framsýningini verða 12 – 15 málningar, og hon letur upp tann 4. maj klokkan 16, og er opin fram til 22 mai. Til ferniseringina verður livandi tónleikur.

Annars sigur Eivør, at nú er hon byrjað at syngja aftur. Clickhaze var við á konsert í mentanarhúsinum í Fuglafirði um vikuskiftið.

– Nú fara vit á Nibe og Roskilde festivalin í juni, og síðani fara vit kanska á eina lítla rundferð í Skandinavia, sigur Eivør.


Frá Norðoya Javnaðarfelag
- tiltøk fram til valið!!

Javnaðarcafé verður aftaná flaggdagshaldið í kjallaranum í Atlantis

Leygarkvøldið tann 27. apríl kl. 20.00 verður politiskt hugnakvøld í Bøgøtu 3 við tónleiki, skemti, felagssangi og upplestri.

Gestarøðarar:
Bartal Nolsøe Poulsen frá SU
Atli Dam, fyrrv. løgmaður

Sunnu- og mánakvøldið er opið hús í kjallaranum í Atlantis frá kl. 19.00

Valdagin er opið frá kl. 10.00 í kjallaranum í Atlantis

Øll eru hjartaliga vælkomin

Norðoya Javnaðarfelag


Mikkjal Hvannastein, gittarspælarin í I AM:

# Vil hava avbjóðingar

**Mikkjal Hvannastein, sum hevur verið gittarspælari í I AM seinastu seks árini, hevur valt at gevast sum gittarspælari í bólkinum. Grundina sigur Mikkjal vera, at hann vil spæla okkurt, sum er meira krevjandi**



*Mikkjal Hvannastein, sum seinastu seks árini hevur spælt gittar í I AM hevur valt at gevast*

TÓNLEIKUR
*Ingrid Bjarnastein*

– Eg vil koma víðari, eg vil spæla meira og tað eg vil spæla skal vera meira tekniskt krevjandi, sigur Mikkjal Hvannastein, gittarspælari í I AM.

– Eg havi gjørt nógvan tónleik sjálvur, og eg havi tosa við aðrar tónleikarar, og kanska kemur okkurt burturúr har. Sjálvt um eg havi valt at gevast í I AM, so fari eg heilt víst at hava nóg mikið at gera.

Mikkjal sigur, at hinir í I AM taka tað ógvuliga lætt, at hann er givin. Men sjálvur er hann avgjørdur, tíðin er komin at taka seg saman og gera okkurt við tónleikin.

– At ferðast til Klaksvíkar var nú heldur ikki tað stuttligasta í verðini. Vit hava ikki spælt nakað serligt í seinastuni. Síðani novembermánaða í fjør hava vit bara spælt til eitt tiltak. Vit spældu í Mentanarhúsinum í Fuglafirði um vikuskiftið, og fyrr var tað soleiðis, at tá eg fór á pall, so hevði eg ongantíð nervar. Men av tí, at tað var so langt síðani seinast, fekk eg nervar hesuferð, og soleiðis eigur tað ikki at vera.

Sjálvur býr Mikkjal í Havn, og sigur hann, at møguleikarnir eru nógv fleiri í høvuðsstaðnum enn í Klaksvík. Nú hevur hann hug at fara tann instrumentala vegin. Spæla Toto, Dream Theater, Extremelíknandi tónleik. Í løtuni undirvísir Mikkjal eisini í gittarspæli á Tórshavnar Kvøldskúla.

– Nú eri eg opin fyri øllum avbjóðingum. Í juli mánaða skal eg spæla saman við Edvard N. Debess, Kaj Johannesen, sum er kendur úr Moirae, Magnus Johannesen og Sharon Weiss. Vit fara at spæla keltiskan tónleik, sum er ógvuliga krevjandi, og har eru nógvar detaljur, og tað leggi eg meg nógv eftir.

Mikkjal sigur, at tað hevur verið læruríkt at spæla við I AM, men tað er ikki nakað hann beinleiðis fer at sakna. – Eg fari at sakna mátan løgini komu fram uppá. Einaferð vandu vit tríggjar ferðir og heili tvey nýggj løg komu burturúr.

Men tíðin er komin at royna nakað nýtt. Mikkjal er ikki longur. Hann var.



# 27 av 40 arbeiðsplássum vantaðu hjálmar

ARBEIÐSEFTIRLIT
*Ingrid Bjarnastein*



*27 av teimum 40 arbeiðsplássunum, ið kannað vórðu, brutu lógina, tí hjálmar vórðu ikki nýttir á arbeiðsplássinum*

Frá oktober til desember í fjør kannaði Arbeiðseftirlitið umleið 40 virkir og arbeiðspláss kring landið. Grundin til, at hetta varð gjørt var at kanna eftir um hjálmar verða brúktir, har tað er krav sambært reglum eftir arbeiðsumhvørvislógini. Av kannaðu arbeiðsplássunum vórðu 27 mál sent til fútan við áheitan um at reisa ákæru fyri brot á galdandi reglur.

Sambært kunngerð nr. 136 fyri byggipláss og líknandi, byrjar arbeiðseftirlitið í mai mánaða eitt átak ímóti vandanum fyri arbeiðsskaðar, tá arbeitt verður høgt upp, og har vandi er tilstaðar, at ein kann detta niður.

– Tiltøk skulu setast í verk, tá arbeitt verður í hæddini. Tá verður hugsað um, at fallið er meira enn tveir metrar, verður sagt av Arbeiðseftirlitinum. – Har serligur vandi er niðri undir, kann talan verða um fall minni enn tveir metrar.

Arbeiðsgevarin eigur at syrgja fyri, at neyðug tiltøk eru tilstaðar at arbeiðið verður gjørt á tryggan hátt , og tann arbeiðandi eigur at syrgja fyri, at trygdartiltøkini verða fylgd.

Brot á omanfyrinevndu kunngerð verða send til fútan, sum tekur støðu til, um ákæra skal reisast ella ikki. Tann ákærdi kann vænta bót, sum fútin ásetur við sektaruppskotið. Um bótin ikki verður goldin, endar málið í rættinum.

# Flagga í Kollafirði

*Skótarnir í Kollafirði skipa flaggdagin fyri flaggdagshaldi. Møguleiki verður eisini at fáa kakao og bollar*



FLAGGDAGSHALD
*Ingrid Bjarnastein*

Flaggdagin klokkan 16.00 skipa KFUM og –K skótarnir í Kollafirði í skúlagarðinum. Skótar og ítróttarfólk ganga skrúðgongu frá Bygdarhúsinum út í skúlagarðin, har Marjun Bæk flytir fram røðu. Næmingarorkestrið Norðljómur og Kristiliga sangkórið syngur.

Tá hetta er liðugt, verða ókeypis bollar og kakao at fáa í skótahúsinum, og okkurt serligt verður til børnini. Eisini verður køkutombola og fiskirunnur í skúlanum í samband við, at skótarnir fara á landslegu í Noregi í summar. Lutaseðlarnir verða drignir klokkan 18.00.

# Formaðurin afturvaldur

AÐALFUNDUR
*Ingrid Bjarnastein*

16. mars hevði Føroya Pedagogfelag aðalfund. Á skránni var formansval, har Carita Björklund varð afturvald. Hon hevur verið formaður síðani 1998. Einki annað formansevni var. Eisini var nevndarval. Marita Ejdesgaard varð afturvald, meðan gitte Henriksen er nýggjur nevndarlimur.

Í nevndini sita:
Carita Björklund, formaður,
Ann Elisabeth Joensen,
Bjørghild í Geil,
Marita Ejdesgaard og
Gitte Henriksen.



*Carita Björklund varð á aðalfundinum hjá Føroya Pedagogfelag afturvald sum formaður*

## FM í gongulagskapping

RÍÐING
*Ingrid Bjarnastein*

Vikuskiftið 27. og 28. apríl skipar Føroyskt Íslandsrossafelag fyri fyrstu FM-gongulagskapping í ár á felagsøkinum við Kráarheyg. Trav og skeiðkappingar byrja á vøllinum hjá Føroya Ríðingarfelag klokkan 10.00 leygardagin. Leygardagin klokkan 14.00 verður byrjað við sjálvum gongulagskappingunum uppi á við Kráarheyg, og um somu tíð sunnudagin vera finalurnar. Kappingin fekk góða undirtøku í fjør, og fyrireikararnir vóna, at luttøkan verður uppaftur størri í ár.

Sum nakað nýtt, so er hesuferð eisini ein kapping fyri ung undir 16 ár. Fyri nøkrum árum síðani var fyri nøkrum árum síðani fastur táttur, og nú verður gjørd aftur ein roynd, fyri at fáa fleiri ung at luttaka við rossum sínum.

Kaffi, køkur og annað gott verður til keyps á staðnum. Seinasta freist at tekna seg til kappingarnar er hóskvøldið klokkan 22.00 á telefon 224412 og 211830

## Tríggir nýggir í verkfrøðingafelagnum

AÐALFUNDUR
*Ingrid Bjarnastein*

Føroya Verkfrøðingarfelag hevði aðalfund tann 6. apríl, og nú hevur nýggja nevndin skipað soleiðis:

Poul Poulsen, formaður

Signar Heinesen, nývaldur næstformaður

Jan Poulsen kassameistari

Erik Joensen, nývaldur nevndarlimur

Michael Thomsen, nývaldur nevndarlimur

Tiltakslimirnir eru Rikke Larsen og Tina Johannesen. Fyrrverandi formaðurin, Suni Jacobsen stillaði ikki uppaftur, og tað gjørdi næstformaðurin, Dan Olsen heldur ikki.